# óndur í Gøtu







*Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eystur kommunu, fegnast, at eitt nýtt skip er heimahoyrandi í kommununi*

*Mynd: Tórheðin J. Jensen*

## Dagsskrá hjá Tróndi í Gøtu

Í gjár kom skipið til Føroya. Eftir at hava verið inni á Gøtuvík og víst skipið fram varð farið til Runavíkar, har skipið skal hava havn í framtíðini. Skipað varð fyri stórari móttøku klokkan 17.

Í dag hevur skipið verið ein túr við skúlabørnum, so tey eisini sleppa at síggja skipið.

Í morgin fer skipið ein túr úr Runavík klokkan 9, og ætlanin er at koma inn á Havnina klokkan 10. Bygdarfólk og onnur hava møguleika at fara við.

Mánadagin verður riggað til, og so er ætlanin at fara til fiskiskap eftir svartkjafti mánakvøldið ella týsdagin.



*Nógv børn vóru komin úr Eystur kommunu at taka ímóti Tróndi í Gøtu*

*Mynd: Tórheðin J. Jensen*

milliónir krónur um árið, um tað skal ganga sum ætlað, men soleiðis verður ikki í ár.

– Tað er ótrúliga langt at siga, hvussu árið í ár fer at vera. Vit fara eftir svartkjafti nú, og í august byrjar so ordiliga árstíðin hjá okkum. Og tað er eisini so nógv tekniskt umborð á skipinum, at tað tekur eina tíð hjá manningini at kenna skipið ordiliga, sigur Dávið Jacobsen.

### Meira teknikkur

Sum við nógvum øðrum nýggjum skipum er nógvur nýggjur teknikkur umborð á Tróndi í Gøtu. Eitt er ein mátari, sum vísir oljunýtsluna hjá skipinum alla tíðina.

– Tað hevur ótrúliga nógv at siga, hvussu nógv verður brúkt í olju. Ofta sigur mann, at vit hava gjørt ein túr, og at vit hava fingið so og so nógv burturúr. Men hvussu nógv hevur túrurin kostað?, spyr Dávið Jacobsen.

skipan, ið er umborð á Tróndi í Gøtu, sum alla tíðina sigur, hvussu nógv olja er brúkt í mun til hvørt kilo av fiski, sum er komið umborð.

Ætlanin er, at nú Tróndur í Gøtu er komin til Føroya, skal hann fara til fiskiskap í komandi viku, og tá verður farið eftir svartkjafti.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| **Skipaslag:** | Nótaskip og trolari |
| **Smíðiár:** | 2010 |
| **Longd:** | 81 metrar |
| **Breidd:** | 17 metrar |
| **BT:** | 2900 tons |
| **Byggikostnaður:** | 250 milliónir krónur |
| **Manning:** | 12 |
| **Maskinorka:** | 6000 + 1500 KW |
| **Eigari:** | P/F Hvamm |